# Meet The Parents

Greg Focker (Ben Stiller) er púra vekk í damuni hjá sær, ið eitur Pam Byrnes. Tá systir Pam giftist og heldur brúdleyp, búgva Pam (Teri Polo) og Greg hjá foreldrunum hjá Pam á Long Island hetta vikuskiftið brúdleypið er. Nú heldur Greg tað verða eitt gott høvi at fríggja til Pam. Men so skjótt sum Greg hittir foreldrini hjá Pam, so byrjar tað heila at ganga øvugta vegin, ið Greg hevði ætlað tað - tað vil siga, heilt galið. Pápi Pam, fyrrverandi CIA-agenturin Jack Byrnes (Robert De Niro), fær umgangandi illgruna til sjeikin hjá døtrini. Jack sigur bart út, at hann heldur einki um starvið hjá Greg, sum er sjúkrasystir ella sjúkrahjálpari. Tann heilt vanligi og jødiski Greg, ið ikki hevur tær stóru framtíðarætlanirnar, fær ofta at vita at hann ikki er tann rætti til Pam. Og sum vikuskiftið líður ger hetta støðuna hjá Greg alsamt spentari. Hann roynir alt hann kann fyri at gera seg væl við familjuna, og serliga familjuhøvdið, Jack Byrnes. Men allar hesar royndir miseydnast so grúiliga - hann oyðileggur næstan vakra heimið hjá Byrnes-familjuni og er líka við at fáa brúdleypið útsett ella kanska avlýst. Men ringast av øllum hesum er at kettan, ið pápi Pam elskar yvir alt, Jinxie, hvørvur brádliga uttan nakað spor. Men hevur Greg nakað við hetta at gera?

**Amerikanskur skemtifilmur frá 2000**
Jack Byrnes: Robert De Niro. Greg Focker: Ben Stiller. Pam Byrnes: Teri Polo. Dina Byrnes: Blythe Danner. Larry Banks: James Rebhorn. Debbie Byrnes: Nicole DeHuff. Kevin Rawley: Owen Wilson.


Greg Focker og familjan Byrnes

*FBI-agenturin, Jack Byrnes, hevur einki álit á unga Greg Focker*




*Robert De Niro stórtrívist í leiklutinum sum Jack Byrnes. Partur tvey av hesum filminum, Meet the Fockers, er settur at hava frumsýning í biografum í kvøld*

# Ragtime

**Á DR2 sunnukvøldið kl. 18.10**


*Howard E. Rollins bleiv innstillaður til eina Oskar fyri sín leiklut sum jazz-pianisturin Coalhouse*

Nógv rósti leikstjórin Milos Forman stendur aftanfyri hesa filmsgerðina av bestselleranum hjá E.L. Doctorow við heitinum Ragtime. Filmurin er yvir tveir og ein hálvan tíma langur og lýsir amerikanska samfelagið í árinum 1906. Vit fylgja nøkrum persónum, sum í byrjanini ikki hava nakað við hvønn annan at gera. Men so líðandi, í hesi breiðu søgugongdini, sæst at allir persónarnir hava eitt ávíst samband. Í miðjuni er ein vanlig miðalstættarfamilja, ið kemur í hóslag við teir meiri vandamiklu streymarnar í amerikanska samfelagnum. Hendan familjan tekur sær av einum afro-amerikanskum nýføðingi, ið tey finna í havanum. Og seinni taka tey eisini til sín ta ógiftu mammuna. Tað vísir seg, at pápin er tann kendi jazz-pianisturin Coalhouse Walker Jr.. Men hesin Coalhouse hevur annað at hugsa um enn at vera pápi. Nakrir rasistiskir limir úr lokala sløkkiliðnum hava spottað og hildið hann fyri gjøldur, hann krevur at fáa endurreisn. Men hetta fær hann ikki. Hann og vinmenninir taka síðan lógina í egnar hendur. Og so kemur løgreglan uppí leikin.

Leikstjórin Milos Forman byrjaði á síni yrkisleið við at gera sínar kekkisku filmar kendar kring heimin, síðan hevur hann leikstjórnað størri Hollywood-filmar:
One Flew Over the Cuckoo's Nest (1975)
Hair (1979)
Ragtime (1981)
Amadeus (1984)
Valmont (1990)
The People vs. Larry Flynt (1996)
Man on the Moon (1999)
Way Past Cool (2003)